VIÐMERKINGAR

# Orkupolitikkur vinnumálaráðharrans

**Kristian Holm Stórhamar**

Eg má siga, at tað er nógv vatn runnið í ánna síðan eg sat úti á loftinum á Eldeildini á Tekniska Skúla fyrst í 1993. Hevði valt at læra handverk og fara í læru eftir at verða troyttur av at ganga í skúla. Eftir at leiðin varð gingin til Havnar har nýggjur kappitul í lívið mínum byrjaði, minnist eg serliga aftur á undirvísing í matematikk við Bjarna Djurholm. Minnist ein av fyrstu tímunum, har Bjarni hugtók meg við at rista úr ermuni og grifla talvuna fulla av cosinus, sinus og eindarcirklinum, alt uttan so mikið sum at skeita í bók. Hann grifflaði og greiddi frá á ein hátt, at eg fekk samanhang og skilti trigeometriina. Minnist komin suðuraftur henda fríggjadag, at eg segði mammuni frá um hendan fantastiska læraran og royndi at forklára henni, hvat eg hevði lært!

Nú 12 ár seinri má sigast, at eg ikki eri líka imponeraður av matimatikklæraranum av Tekniska Skúla. Ivist onkuntíð í, tá eg við áhuga lesi onkra viðmerking ella grein um Tekninska Skúla og umstøðurnar har, um Bjarni hava gloymt sína fortíð og starvsfelagar í Smiðjugerði.

Nakað sum er nógv uppi í tíðini í dag er orka og orkupolitikkur! Og fyri at seta gongd á hetta kjakið, hevur Bjarni sent boð eftir Bjørn Lomborg og seinni Svend Auken. Haldi tað er skilagott, at man setur hol á hesa diskutión, og tað er uppá tíðina, at vit fara at hyggja eftir hvussu vit framleiða orku, um vit nú brúka orkuna skilagott, umframt at taka meiri atlit til náttúruna.

Men haldi ikki Bjarni nýtist Auken ella at leita við luppi fyri at vita, hvat hann kann gera fyri at spara orku. Haldi at Bjarni kundi byrja við egnum málsøki.

Sum vinnumálaráðharri varðar Bjarni av Landsverki. Ein av deildunum hjá Landsverki er asfaltverkið. Og verður tað gjørt uppi í Hundsarabotni, hvat eg haldi er høpisleyst!

Um vit hyggja eftir, hvat innihaldi er í asfalti, er tað í høvðusheitum, skervur, bikumen og sement.

Skervurin er úr Noregi ella verður framleiddur úr grótið av Skørðunum í Porkeri.

Tað vil siga, at alt ella mesta tilfarið verður silgt til Kollafjarðar antin úr suðri ella úr útlandinum. Tá hetta tilfarið er komi á kajuna í Kollafirði, verður tað koyrt til fjalls fyri at verða blandað, fyri síðani at verða koyrt omanaftur. Og í ringasta føri, verður lidna asfaltið kanska siglt aftur til Suðriar og kanska koyrt niðan aftur á Skørðina í Porkeri fyri at verða lagt á vegin har.

At koyra stórt sæð alt tilfari niðan á fjallatindarnar bert fyri at blanda tað, fyri síðan at koyra tað oman aftur, vil eg kalla "at troðsa náttúrulógirnar". Og man kann spyrja, hvar er logikkurin?

Tað er væl skiljandi, at aðrir framskygnir menn síggja møguleikar í at kappast við slíka framleiðslu!

Eg haldi, at tað er uppá tíðina, at Landsverk endurskoðar hesa prosess, og vil eg mæla til at henda framleiðsla verður flutt oman á slætt og helst lagt á eina kaj. Og hví so ikki flyta asfaltverkið til Suðriar, har einasta rávørugrundarlagi er til slíka framleiðslu. Asfaltið kann siglast norður um fjørðin, tá tað er liðugt.

Á henda hátt gerst framleiðslan munandi bíligari. Man skal eisini hugsa um, at grótið, sum verður silgt norður í dag, er ikki liðugt knúst, tað vil siga, at man siglur eisini nakað av avfalli norður um fjørð.

Tað kundi verið áhugavert at lagt asfaltframleiðsluna við síðuna av Elverkiðnum hjá SEV í Vági, og nýtt avlopsorkuna til at gjørt asfalt; so kundi man fingið tvær flugur við ein smekk!

At flyta asfaltblandingina til Vágs, vil eisini geva nøkur hart tiltrongd arbeiðspláss og vildi eisini verið í tráð við útjagarapolitikkin hjá samgonguni.

Um Bjarni fær asfaltverkið oman á slætt, verður eisini meiri rúm á fíggjarlógini fyri einari hart tiltrongdari útbygging av tekninskaskúla!

Um Lomborg og Auken verður ofta sagt, at teir hava mótsattar meiningar um orkupolitikk, men ivist ikki í, teir vildu verið sera samdir um at asfaltblandingin hjá Bjarna sum hon er í dag, ikki hevði fingið grøna stempllið.

**PS.** Anna dømi um at Landsverk ikki altíð arbeiðir í rættari hæddarkurvu er hovstunnilin!

# Nú kom jørðeldur í vina- og kenningapolitikkin hjá løgtingslimum

**Bjørn Patursson**
*Nevndarformaður, Bóndafelag Føroya*



Landsstýrismaðurin í vinnumálum Bjarni Djurholm hevur fleiri ferðir roynt at gera broytingar í lóg um landsjørð. Næstan hvørjaferð hevur løgtingið sent honum uppskotini retur tí, háttvirda ting vil hava eina heildarætlan um, hvat man vil við almennu jørðini og landbúnaðinum. At enda máttu so broytingar gerast, tí landsgrannskoðarin talaði at, soleiðis sum støðan við Jarðarráðnum var.

### Ein arbeiðsbólkur situr júst við hesum spurningi

Hesin sami landsstýrismaðurin er so avgjørt tann effektivasti, ið verið hevur í mong ár fyri landbúnaðin, tí hann gjørdi skjótt av at seta ein bólk til at gera eftir ordra løgtingsins um at gera eitt uppskot til ein landbúnaðarpolitik og struktur fyri landsjørðina soleiðis, at tingfólk og onnur sum hava áhuga, greitt vita, hvussu politikkurin og hvør strukturin í landbúnaðinum verður í framtíðini. Arbeiðsbólkur er farin til verka, og fyrsta málið á skránni er júst strukturin í landsjørðini. Her eru nógvir og eymir spurningar at taka støðu til, men nevndin hevur sett sær fyri at arbeiða effektivt og skjótt undir leiðslu av Búnaðarstovuni.

### Sum ketta upp úr høvdatrog

Hetta lógaruppskotið kemur nú sum eitt ógvuliga forstýrandi element, meðan arbeiðsbólkurin situr og leggur út í kortið júst soleiðis, at løgtingslimir skulu fáa væl undirbygt og strukturerað tilfar at taka støðu til. Tá hetta er framlagt var tað meir mansligt av Sjálvstýrisflokkinum at komið við broytingaruppskoti, um hann ikki var nøgdur.

### Panikkur í fyri at skava inn undir seg

Men hvat ger løgtingið nú! Jú uttan um landsstýrismannin verður lógaruppskot lagt fram um at selja traðirnar frá festunum, soleiðis at nøkur fá kunnu ríka seg upp fyri alment tilfangi. Hetta mál er júst sum fiskurin eitt alment tilfangi, sum nú skal forerast nørkum fáum bert við einum endamáli og tað er spekulasjón. Tí um tað ikki var so, hvat er so galið við leigitraðunum? Nú er aftur hesin vina- og kennigapolitikkurin komin í hásætið. Nú mugu vit skunda okkum at fáa krámað alt sum kann krámast, áðrenn ein heildarætlan kemur á borðið. Hendan vanliga nalvaskoðanin.

### Vælsignaðir gevið eitt sindur av toli aftrat

Gevið arbeiðsbólkinum tíð og ein tjans einaferð með alla at koma til ein konsensus, sum landsstýrismaðurin síðani kann bera niðan í tingið. Tá fær tingið nakað at tosa út frá og taka støðu til.

HVÍTVØRUR
damor



Vaskimaskina WIXXL 166
· Kolfríur motorur
· Centrifugeringsferð 1600 sn./min
· Vaskistødd: 7 kg
· Orkuflokkur: A
· Vaskievni: A
· Centrifugeringsevni: A
· 16 vaskiprogrammer
· Ullvask

7.998,-



Kondensturk trumla IS 70 C
· Elektronisk ondens turkitrumla
· Stórur kondensvatnbakki
· turkistødd: 7 kg
· 15 turkiprogrammer
· Automatisk programmir
· Kaldlufts turking
· Reverserandi trumla

4.998,-

Fá bæði fyri 9.998,-



Vaskimaskina WILB 12
· Centrifugeringsferð 1200 sn./min
· Vaskistødd: 5 kg
· Orkuflokkur : A
· Vaskievne: A
· Centrifugeringsevni: B
· 16 vaskiprogrammer
· Ullvask
· eyka skol
· Pletfjerner program
· Quick program
· Trinleysur hitaveljari

5.498,-



Tíðarstýrd turkitrumla IS 60 V
· Energiklassa C
· Turkistødd: 6 kg
· 2 temperaturar
· Reverserandi trumla
· Endar við kaldari luft

3.498,-

Fá bæði fyri 6.998,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor